Til Flogbóltssamband Føroya

KÍF setur fram hesar umbønir til komandi kappingarár.

KÍF vil at okkara lið í 1. deild spælir sínar landskappingar dystir beint aftaná okkara meistaradeilarlið hevur spæl dyst. Báðir dystir skulu sjálvandi spælast á sama stað. Á hendan hátt hava fleiri av teimun leikarnum, sum sita nógv á beinkinum á besta liðnum, møguleika at spæla fleiri dystir og á tann hátt fáa meira spælitíð.

KÍF ynskir at FK kappingin fyri vaksin er tann fyrsta kappingin á árinum. Tað vil siga at kappingin liggur seinast í september ella fyrst í oktober.

KÍF ynskir at Mjølnir kappingin fyri vaksin er fyrsta kapping eftir árskifti og liggur fyrsta vikuskifti í januar

KÍF vil at hálvfinalur í steypakappingini fyri vaksin ikki liggur fyrsta vikuskifti í januar

KÍF bjóðar seg fram at skipa fyri tveimun kids kappingum komandi kappingarár. Fyrra kapping tíðliga í oktober og seinna kapping tíðliga í november.

KÍF er komin til tað niðurstøðu at kappingin hjá gentum 14 í ár ikki var góð. Gentur 14 hjá KÍF spældi dystir 5 vikuskifti alt kappingarárið, harav mótstøðu liðið ikki møtti upp tað eina vikuskifti. Fysta økiskapping hjá KÍF var 10. oktober, næsta økiskapping var 16. januar, alt ov leingi millum dystinar. Samstundis vóru bert tvær steypakappingar fyri gentur 14 í árinum. KÍF biður um at fáa eina sera góða landskapping fyri gentir 14 komandi kappingarár.

KÍF vil at tá ið landskappingar hjá yngri deildum eru skipaðar í bólkar, skulu liðið eisini spæla um fimta pláss og niðureftir, ikki bara spæla um bestu fýra plássini. Tað kann koma fyri at bólkar eru ójavnir í dygd, at lið sum ikki koma í endaspælið ongantíð spæla móti hvørjum øðrum alt kappingarárið.